## Mentamálaráðið
Mentamáladeildin

### FULLTRÚI

Eitt áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt starv sum fulltrúi er leyst at søkja í Mentamáladeildini.

**Starvið**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:
- At fyrisita, tryggja menning og samstarv og at røkja samskiftið við stovnar og øki undir Mentamáladeildini og taka sær av málsviðgerð í hesum sambandi
- At arbeiða við verkætlanum og uppgávum
- At ráðgeva og vegleiða í spurningum innan økið, tilevna uppskot til lógir, kunngerðir, reglur o.a.
- At umsita virkisøki, sum verða løgd til fulltrúan
- At taka lut í arbeiðsbólkum
- At taka sær av málsviðgerð sum heild
- At røkja aðrar fyrisitingarligar uppgávur

Fulltrúin skal tryggja, at nevndu uppgávur verða loystar á einum høgum fakligum stigi, og at mannagongdirnar eru í samsvari við nútímans krøv.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal:
- hava útbúgving frá lærdum háskúla
- kunna arbeiða sjálvstøðugt umframt samstarva í arbeiðsbólkum o.l.
- vera tænastusinnaður, fyrikomandi og hava góð samstarvsevni
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Mentamálaráðið arbeiðir við elektroniskari skjalahandfaring, og er fyrisitingin tí pappírsleys. Upplæring fæst í hesi skipan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
**Hoyvíksvegur 72**
**Postrúm 3279**
**110 Tórshavn**
**ella til t-post: mmr@mmr.fo**

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 17. apríl 2006, kl. 16.00.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra, Petur Petersen, aðalstjóra, á tlf. 35 50 50, ella við at vitja heimasíðu okkara "www.mmr.fo"

samsir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentanarmál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. **Mentamálaráðið** er skipað í tríggjar deildir – Mentamáladeild, Fólkaskúladeild og Vinnu- og miðnámsskúladeild – umframt ein stáp, sum veitir ráðgeving til deildirnar o.o.
**Mentamáladeildin** hevur fyrisitingina av hægri útbúgvingum, mentamálum, gransking, søvnum, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Harafturat fyrisitur deildin ávísar uppgávur viðvíkjandi kirkjuni.

# Dagrøktarar til Leirvíkar kommunu

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir dagrøktarum og møguligari hjálp, at byrja tann 1. mai 2006.

**Vit ynskja at tú**
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri.
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum.
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni.
- Ert tolin og vísir umsorgan.
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini.
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar.

Í dagrøktarskipanini starvast 8 dagrøktarar og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 40.

Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktarnir ísenn við børnunum í fimleikarhøllini.
Arbeiðstíðin er ímillum 7.30-17.15. Lønin er sambært sáttmála við FA.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443251 og tosa við Marion Leifsdóttir, dagrøktarleiðara.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. apríl 2006.

Vinarliga send umsókn tygara til

**Leirvíkar Kommunu**
**Dagrøktarskipanin**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**



Kokkur og kokkalærlingur søkist

Gourmet v/Leif Sørensen

GR. KAMBANSG. 13 · TÓRSHAVN · TEL 322525 - 217575

# Frá Eysturoyar eystara Bjargingarfelag

Aðalfundur felagsins verður á Brandstøðini í Fuglafirði mánadagin 10. apríl 2006 kl. 20.00.

Skrá sambært lógini.

**Nevndin**

Lesið
**Sosialin**
-so eru tit við!

# Lærari til Hoyvíkar skúla

Søkt verður eftir vikari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 1. mai og restina av skúlaárinum. Starvið er 20 undirvísingartímar á 5. árgangi í føroyskum, donskum, enskum, kristni, søgu og ítrótti. Lærarin er flokslærari og arbeiðir í samstarvi við 5. floks toymið.

Lønt verður eftir sáttmála við fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og royndum skulu sendast til:

**Hoyvíkar Skúla**
Postrúm 3073
110-Tórshavn

áðrenn 18. apríl.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjóran á tlf 302590 ella 227603.

Hoyvíkar Skúli

**Birgit Arge**
Skúlastjóri
Hoyvíkar Skúli

*Í Hoyvíkar Skúla ganga 454 næmingar. 37 lærarar starvast í skúlanum.*